# Skúlin á Fossánesi

**Starv í Skúlanum á Fossánesi skúlaárið 2007/08**

- Eitt starv, avlopstímar, umleið 20 tímar um vikuna. Endaliga tímatalið verður fastlagt 1. september

**Tann ið settur verður skal:**
- Undir ábyrgd leiðslunnar taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- Duga at samstarva og vera fyrikomandi
- Vera fús/ur at taka á seg tær uppgávur, ið eru á skúlanum
- Vera stundislig/ur og nærløgd/lagdur

**Førleikakrøv:**
Tann, sum settur verður í starv, skal hava lærara-útbúgving .

**Løn:**
Lønt verður sambært avtalu millum Føroya Lærara-felag og Fíggjarmálaráðið í lørnarflokkunum 18.1 – 27.4

**Umsóknir:**
Umsóknir við c.v., og avriti av prógvum skulu vera skúlaleiðaranum í hendi í seinasta lagi mánadagin 25. juni

Fleiri upplýsningar um starvið fært tú við at venda tær til Poul Jacob Zachariassen, skúlaleiðara á tlf. 452120 ella 585894

**SKÚLIN Á FOSSÁNESI**
730 Norðdepil · tlf. 452120 · fax 452122
T-postur: fos@skulin.fo · www.skulin.fo/fos

**Skúlin á Fossánesi** hevur komandi skúlaár 41 næmingar, sum ganga í 1. til 7. flokki. Tað verða 5 lærarar og ein stuðul. Skúlin er væl útgjørdur við bókum og amboðum. Sí annars heimasíðuna.

# Starvsfólk til Starvsmannafelagið

**Starvsmannafelagið søkir eftir starvsfólki til umsiting felagsins at byrja eftir avtalu.**

**Uppgávu:**
Starvsmannafelagið er í holtur við at menna felagið og sóknast tí eftir fólki, ið við ágrýtni og fakfelagsanda skal røkja áhugamál felagsins og verða viðspælari hjá nevnd og tæna limum felagsins. Tú kemur at starvast í umsiting felagsins og eisini taka lut í dagliga umsitingarliga arbeiði felagsins. Høvuðsdentur verður lagdur á uppsøkjandi arbeiði, tiltøk í húsum okkara og vera við til at stinga út í kortið framtíðarhugsjónir felagsskapi okkara at gagni.

**Førleikar:**
Vit leita eftir einum starvsfólki við kunnleika til og áhuga fyri fakfelagsarbeiði, ið eisini hevur góð samstarvsevnir og hevur lætt at samskifta. Kravt verður, at tú megnar at arbeiða sjálvstøðugt og undir trýsti.

Fyrimunur er at hava umsitingarligar royndir, góðan teldufør leika, umframt góðan kunnleika til enskt.

**Setanartreytir:**
Starvið er fulltíðarstarv, við møguleika fyri niður-settari arbeiðstíð. Vit bjóða eitt livandi og av-bjóðandi starv við menningarmøguleikum, har tænasta og limarøkt er í hásæti.

Starvið verður sett og lønt eftir sáttmálanum millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknin skal vera Starvsmannafelagnum í hendi 1. juli 2007. Merkið brævbjálvan: **Umsókn**. Meira fast at vita um starvið við at venda sær til Gunnleiv Dalsgarð, formann felagsins á tlf. 314868.

**Starvsmannafelagið**
**J.H. Schrøtersgøta 9**
**Postboks 165**
**110 Tórshavn.**

**Starvsmannafelagið** er stórsta fakfelag á almenna arbeiðsmarknaðinum við uml. 1900 limum, sum starvast í teimum 4 sáttmálaøkjum felagsins, Fíggjarmálaráðnum, Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya, S.E.V og Føroya Tele (Føroya Arbeiðsgevarafelag), felagið hevur í dag tilsamans 116 álitisfólk á arbeiðsplássunum innan sáttmálaøkini. Starvsmannafelagið gevur út Starvsblaðið og hevur umframt kunning á heimasíðu felagsins www.starvsmf.fo. Í umsiting felagsins starvast formaður og skrivari felagsins.

# Fulltrúi í Løgtinginum

**Í umsiting Løgtingsins er eitt starv sum fulltrúi leyst at søkja.**

**Arbeiðsuppgávurnar hjá fulltrúanum verða hesar:**

- Nevndarskrivari og løgfrøðiligur ráðgevi í 3 tingnevndum
- Eftirkanna lógaruppskot og vera løg-frøðiligur ráðgevi hjá flokkum og tingmonnum í málum, sum náttúrliga hoyra til omanfyrinevndu nevndir
- At luttaka í vanligari málsviðgerð í umsiting Løgtingsins, og eru uppgávur hennara í stuttum hesar:
  - at taka sær av øllum umsitingarligum uppgávum Løgtingsins
  - at vera ráðgevi hjá Løgtingi og løgtings-nevndum í øllum løgfrøðiligum spurningum, herundir at ansa eftir, at øll mál eru løgfrøðiliga og málsliga røtt
  - at røkja skrivarauppgávur í Løgtinginum og løgtingsnevndum
  - at taka sær av skrivarauppgávum hjá Løgtingsins sendinevndum í Norðurlandaráðnum og Útnorðurráðnum

Í umsiting Løgtingsins arbeiða í løtuni 11 fólk, harav 2 løgfrøðingar.

Tann, sum settur verður, skal hava lokið prógv í løgfrøði. Tann, ið settur verður, skal hava áhuga fyri politiskum og samfelagsligum viðurskiftum. Lesandi, sum vænta at verða liðug í summar, eru vælkomin at søkja.

Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmála-ráðið og BLF.

Tann, sum settur verður má tola broytingar í arbeiðsuppgávunum.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Løgtingið, telefon 363900, Súsonnu Danielsen, stjóra.

Umsóknir saman við prógvum, frágreiðing um størv frammanundan og møgulig ummæli skulu vera umsiting Løgtingsins, Tinghúsvegur 1-3, Postrúm 208, FO-110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin, 25. juni 2007, kl. 16.00.



# Rúmlig og góð raðhús til sølu

Húsini eru uml. 104 m$^2$ í tveimum hæddum, í sera góðum standi og liggja miðskeiðis í Havn (Hvalsoyargøta 8).

**Stovuhædd:** Køkur/sova saman, gongd og bryggers.

**Loft:** Baðirúm, gongd, 2 kømur og stórt hjúnarúm við altan

**Ovastaloft:** Rúmligt, við møguleika at innrættast.

Til húsini er urtagarður við brotflísa terassu og lagaðum grótgarði. Umframt 3 p-pláss.

Fleiri myndir kunnu síggjast á: www.123hjemmeside.dk/hvalsoyargota8

Prísuppskot: 1.850.000,-

**Áhugaði kunnu ringja: 519899 & 266477**

# Sp/f Andrias Berg

Entreprenørvirkið
Marinargøta 6 · 188 Hoyvík
Tlf. 31 65 58 / 21 65 58 · 100 Tórshavn

**Søkt verður eftir førara til lítlan kranabil. Fyrimunur er, um viðkomandi eisini kann koyra gravimaskinu.**

**Talan verður um fast arbeiði.**

FAROE LAW

# Hús á Strondum til sølu

Talan er um hús á Lágarvegi 20, matr. nr. 522. Húsini eru frá umleið 1910 og standa í friðaligum og veðurgóðum umhvørvið. Grundøkið er 584 m2 til støddar.

Ognin verður seld um hóskandi boð fæst og kann síggjast eftir avtalu. Áhugað kunnu seta seg í samband við Jens Wang, adv. á teldupost jwa@faroe-law.fo ella við at ringja á tlf. 359900/ 219903.